# Nøvn

## Føðingar



*9. november 2010 fingu Súsanna og Jónleif Lydersen, Klaksvík, ein son, og Maria og Julia fingu ein lítla beiggja. Hann vigaði 4100 gr. og var 57 cm.*



*Týsdagin 10. mai fingu Fríði og Ró hesa fittu lítlusystur. Hon var 51 cm long og vigaði 3100 gr. Foreldrini eru Jana og Signar Djurhuus, Kollafirði.*

29. apríl fingu Guðrið Hjalt og Sveinur Bech, Porkeri, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3640 gr.

23. apríl fingu Elisabeth Strømsten og Páll Djóni á Steinum, Velbastað, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4250 gr.

28. apríl fingu Sára og Gunnar Olsen, Tvøroyri, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3780 gr.

2. mai fingu Astrid Jacobsen og John Hendrik Poulsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3450 gr.

4. mai fingu Sólmei Eydna og Finn Nolsøe, Kaldbak, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3850 gr.

4. mai fingu Eivi og Kári Finnsson, Saltangará, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4180 gr.

5. mai fingu Jóhanna Dahl Jansdóttir og Rasmus Sommer Magnusson, Norðdepli, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3525 gr.

5. mai fingu Heidi og Bjarni Prior, Sandavági, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3560 gr.

6. mai fingu Arnbjørg Torbjarnardóttir og Pauli Justinussen, Skála, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4000 gr.

6. mai fingu Barbara og Hallur Durhuus, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4000 gr.

6. mai fingu Jóhanna Sofia Petersen og Bernhard H. Petersen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4200 gr.

7. mai fingu Randi Bjørk og Fríður Dalsgarð, Argjum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4100 gr.

8. mai fingu Hansy Skarðheim og Jens Rói Sørensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2830 gr.

8. mai fingu Erla Nielsen og Sigfríður S. Clementsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3500 gr.

9. mai fingu Tóra og Edvard á Hólalagnum, Leirvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3700 gr.

10. mai fingu Kristbjørg Isaksen og Sunvard Joensen, Norðragøtu, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4350 gr.

## TAKK

Eg takki hjartaliga øllum tykkum, sum gleddust saman við mær tann 17. desember, tá eg helt mín 65 ára føðingardag.Takk fyri heilsanir, blómur, gávur og til tykkum øll, sum gjørdi kvøldið so hugnaligt. Ein tøkk til døtur mínar, ið á ein serstakan hátt hjálptu og stákaðust, uttan tykkum hevði hetta ikki kunnað latið seg gera, Harrin signi tykkum øll.

*Heilsan*

**Kamma Johannesen,**

*Fornarætt 1*

*Trongisvágur*

## TØKK

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá mamma, vermamma og omma okkara

**Trinemia Mikkelsen**

andaðist og varð jarðað.

*Vegna familjuna*

**Pól og Andrias**

# Heilsan til Ásu Lützen á 70 ára degnum



*Eins og vaktarar stóðu á Zions múri,*
*tú hevur staðið til dagin í dag,*
*slotað og hugt – og vakt úr dúri*
*durvandi fólk – og hevur sæð*
*tey reist seg á føtur í bønaranda*
*til verju og bøn við Zions múr.*
*Ikki við menniskjamátti, men anda*
*tú tey vakti svøvninum úr.*

*Móðir tín lærdi teg Ísrael elska,*
*fólkið runnið av Ábrahams ætt,*
*Ísraels navn í hjarta títt teskað,*
*lært teg at elska fólkið spjatt*
*kring um heimsknøttin útlegdartíð,*
*jagstrað og týnt av hatursmonnum,*
*kendu til armóð, sorg og stríð,*
*men elskað av Gudi av sonnum.*

*Førning tínar móður tú bar fram á leið,*
*hin førning um landið halga.*
*Í fótaspor hennara djørv tú steig*
*í bøn til Gud hin alvalda,*
*um at føra fólkið til heimlandsins grund*
*til sítt óðal við Guds arvaskjali,*
*sum profetarnir ritaðu fornu stund*
*um heimkomu teirra í túsundtali.*

*Í tær eiga jødarnir forbønarkvinnu,*
*land teirra elskar - og fólkið við.*
*Í tær eiga jødarnir verjuna stinnu,*
*trúgv stendur tú við teirra lið.*
*Saman við tínum tú trúgv hevur biðið,*
*hjálpt jødunum heim til fedranna grund.*
*Ein dag fer upp hitt "gylta liðið",*
*tá vit savnast við jødum til ævigan fund.*

**Birgit og Svenning av Lofti**